# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## 12

stuttligastu sms'ini frá 3. hálvleiki

### *Viss AB stýrdi heiman á Sandi, so haldi eg teir skuldu skift stýrimann*

*Í dag var egnarin og fiskimaðurin uppá spæl ímóti pedagogunum úr Havn. Toftir eru, og fer altíð at verða ein fiskibygd*

*AB skal nú hava nýggjan stuðul og nýggjar búnar. Talan verður um termodraktir, og høvuðsstuðul verður "Fóm Ísur"*

*Víkingur vildi ikki taka stig frá HB, tí so hevði NSÍ blivið nummar eitt*

*Hvar eru White Tigers. Man hoyrir einki frá teimum*

*B36-arnir eru vorðnir avhaldsmenn. Teir JAVNA ongantíð í einum dysti*

*Finnur Justinussen má fá HANS at leggja sær LAG Á*

*Halló vinningurin hjá tykkum skuldi verið ein kassi við "SEVEN UP" – heilsan NSÍ´ari*

*Malmáðurin hjá Onglandi er til GREEN í dag*

*Víkingur við óhvøssum vápnum. Tað hvassasta var mussaskøðið hjá Atla, ið gav gult kort*

*Eg og HANS syngja sama LAG*

*Sjálvandi brennur Súni Olsen í Havn.... hann dugir jú ikki havna-MÁL*




*Sören Flink, sum er svenskari við serliga stórum áhuga fyri føroyskum fótbólti, handaði leygardagin formanninum í NSÍ, Sølva R. Hansen, nýggja steypið, ið fylgir við heiðrinum »Fair Play Prize«*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# NSÍ steyp úr Svøríki

**FÓTBÓLTUR Runavíkingar fingu fægst gul og reyð kort í landskappingini í fjør, og fyri tað fingu teir leygardagin handað steyp sum vinnara av nýggja »Fair Play Prize«, ið svensk heimasíða letur**

Hilmar Jan Hansen

Síðstu seks árini hevur svenskarin Sören Flink fylgt sera væl við føroyskum fótbólti, samstundis sum hann á heimasíðuni, www.faroenews.se, eisini hevur givið øðrum møguleika til tað. Eisini8 gevur hann teimum vitjandi á heimasíðuni møguleika at tippa um føroyskar dystir, umframt at har finst mangt annað.

Um vikuskiftið var Sören Flink millum annað til dyst í Runavík, har ørindi hansara vóru at handa eitt serligt steyp, sum heimasíða hansara vildi geva NSÍ, tí liðið var tað av øllum, sum kappingarárið í fjør fekk fægst gul og reyð kort.

Heiðurin, ið hann nevnir »Fair Play Prize«, handaði hann NSÍ-formanninum, Sølva R. Hansen, í hálvleikinum, tá NSÍ leygardagin spældi ímóti FC Suðuroy. Talan er um ferðasteyp, so komandi árini verða tað tey »skikkiligastu« liðini, ið sleppa at hýsa steypinum, sum verður latið í samráð við Fótbóltssambandið.

Steypið er eitt serligt glas-listarverk, ið finska Kaisa Tukonen hevur gjørt til endamálið, og sum sæst á myndini, ið varð tikin í Runavík leygardagin, kann tað saktans fríðka um eitt og hvørt steypaskáp! Vit kunnu til stuttleika leggja aftrat, at í løtuni bendir einki á, at NSÍ fær steypið aftur komandi kappingarár, tí í løtuni eru runavíkingar aftastir í kappingini um at fáa »Fair Play Prize« fyri 2010...

*hilmarjan@sosialurin.fo*